FÓTBÓLTUR

VIT TIPPA

Fótbóltsserfrøðingarnir hjá Miðlahúsinum tippa skiftivís um umførini í Effodeildini

ÍTRÓTTUR



Tróndur tippar...

Næsta umfar tippar ***Pætur Albinus***

B36	SKÁLA		EB/Streymur	HAVNAR BÓLTFELAG		VÍKINGUR	ÆGIR					NSÍ	B68							
X	X	2	1	X	2	X	X	2	X	X	2	X	X	2						

1: Heimasigur X: Javnleikur 2: Útisigur



Effodeildin støðan

NR.	LIÐ	DYSTIR	VUNNI	JAVNT	TAPT	+ MÁL	- MÁL	+/-	STIG
1	AB	0	0	0	0	0	0	0	0
2	B36	0	0	0	0	0	0	0	0
3	B68	0	0	0	0	0	0	0	0
4	EB/Streymur	0	0	0	0	0	0	0	0
5	HB	0	0	0	0	0	0	0	0
6	ÍF	0	0	0	0	0	0	0	0
7	KÍ	0	0	0	0	0	0	0	0
8	NSÍ	0	0	0	0	0	0	0	0
9	Skála	0	0	0	0	0	0	0	0
10	Víkingur	0	0	0	0	0	0	0	0

fyrstu ferð skal eydnast at vinna pláss millum fimm tey fremstu. Serligur spenningur er um, hvussu tað fer at roynast, nú liðið fyri fyrstu ferð hevur funnið ein rættan álopsspælara. Her verður sjálvsagt hugsað um Jóan Símun Edmundsson, sum fyri tveimum vikum síðani skrivaði undir sáttmála við AB.

– Vit eru væl fyri, og eingin vandi er fyri, at tað skal enda við niðurflyting, tí umstøðurnar eru so nógv betri, enn tær vóru, tá ið vit fluttu niður fyri fýra árum síðani, sigur miðverjin Morten Overgaard, sum hevur verið skaðaplágaður.

Í Sarpugerði eru teir bjartskygdir:

– Um vit sleppa undan skaðum og leikbannum, kunnu vit røkka langt, og spæla vit upp til okkara besta, so steðgar eingin okkum, sigur venjarin Sigfríður Clementsen.

Í fyrstu atløga verður neyðugt hjá Víkingi, sum mánakvøldið vann stórsteypadystin, at standa seg uttan útisetar, sum tað verður roknað við seinni í summar. Millum hesar eru Sam Jacobsen, Sølvi Vatnhamar og Andreas Lava Olsen.

Sunnudagin kl. 15.00

ÍF - KÍ

Dómari: Petur Reinert

Í Klaksvík eru tey ótolin eftir, at KÍ aftur skal blanda seg upp í, har tað verður kappast um skreyt og pláss í europeisku kappingunum

Tey, sum í fjør vóru eygnavitni, tá ið ÍF í fyrra dystinum hevði vitjan av KÍ, gloyma ongantíð tað, sum gekk fyri seg. KÍ var flúgvandi fyrsta lítla tíman, og tá ið Páll A. Klettskarð í 55. minutti skoraði fyri aðru ferð, og støðan var 3-0 til klaksvíkingar, so tóktist spurningurin bara at vera, hvussu stórur KÍ sigurin fór at verða.

Men so reisti ÍF seg. Øssur Dalbúð skoraði eina ferð, og tá ið Clayton Soares skoraði fyri aðru ferð og javnaði til 3-3, var eitt korter eftir, og síðstu løtuna brendi tað í báðum endum.

Verjuspælið hjá KÍ var lítið sannførandi í 2013. Nú eru Jonas Flindt Rasmussen og Ndende bláir, og KÍ hevur vónir um betri endastøðu enn 8. plássi í fjør:

– Vit halda okkum at hoyra heima longri frammi á talvuni, og vit eiga at vinna størri úrtøku burtur úr nógvu málunum, enn vit gjørdu í fjør, heldur KÍ venjarin Eyðun Klakstein.

Eitt av stóru ivamálunum í Klaksvík hevur verið, um Páll A. Klettskarð fór at verða klárur at spæla í Fuglafirði. Hann hevur verið skaðaplágaður, men eftir steðg í tvær vikur hevur hann síðani mánakvøldið vant við fullari ferð.

Hóast ÍF hevur vunnið silvur í landskappingini tvey tey seinastu árini, so hevur liðið undan kappingarbyrjan



ikki verið roknað at vera evni at vera við í kappingini um FM. Soleiðis tykist tað eisini at vera í ár. Hetta er tó ikki nakað, sum fær roynda venjaran Albert Ellefsen at missa svøvnin.

– Eg rokni við, at tað verða smálutir, ið fara at gera av, hvør verður nummar tvey og trý og átta. HB er mín favorittur at endurvinna meistaraheitið. Sjálvur haldi eg, at okkara lið verður undirmett. Vit hava fleiri profilar, sum hava nógvar royndir. Teir verða ikki serliga nógv órógvaðir av, um tað í eitt tíðarskeið ikki gongur, sum tað verður vónað. Hugburðurin er góður, og vit eru spentir, sigur Albert Ellefsen, ÍF venjari á øðrum ári.

Ivi hevur verið um, hvussu tað fór at verða við superveteraninum í málinum. Umframt at vera málverji hjá ÍF, er Jákup Mikkelsen málmansvenjari á landsliðnum. Fríggjadagin kom hann heim aftur, eftir at hava verið á venjingarlegu við landsliðnum í Spania. Nú hevur Jákup boðað frá, at hann er nóg væl fyri at fara undir kappingarárið, og tað eru teir í Fuglafirði ógvuliga fegnir um. Teir fjala ongantíð yvir, at málverjin er týdningarmikil partur av orsøkini til, at tað tvey tey seinastu árini hevur eydnast at vinna silvurkrónurnar, sum málið er enn eina ferð at verja.

Sunnudagin kl. 15.00

NSÍ - B68

Dómari: Eiler Rasmussen

Tað verður grannauppgerð við Løkin í Runavík sunnudagin. Lítla løtu undan evstamarki fyri spælaraflytingum varð avtala undirskrivað, sum ber við sær, at Kristian Joensen nú er málverji á Svangaskarði. Í fjør var Kristian sjálvskrivaður málverji í Runavík, og hann hevur verið á bæði U21 og A-landsliðunum. Men tá ið hann í vetur fór at landinum at royna eydnuna, so skrivaði NSÍ sáttmála við Andras Gango, sum nú verjir NSÍ málið.

Fyrsti dysturin hjá B68, eftir at Kristian Joensen er komin í felagið, verður ímóti júst NSÍ. Men tað verður ikki Kristian Joensen, sum fer at verja B68 málið sunnudagin. Fyri at undirskriva leigusáttmála um flyting av málverjanum, var tað eitt ultimativt krav hjá NSÍ, at Kristian Joensen ikki skal verja málið, tá ið NSÍ spælir ímóti B68.

Harvið verður tað annar av teimum, sum í fjør vardu B68 málið í 1. deild, sum verður málverji. Sannlíkt er, at tað verður Ragnar Lindholm.

Jógvan Martin Olsen og Øssur Hansen eru venjarar á Toftum, og teir vita, hvat tað snýr seg um:

– Málsetningurin er at varðveita sætið í bestu deildini. Nógv av hinum liðunum hava verið har so mikið leingi, at tey vita, hvat skal til. Hjá okkum eru nógvir nýggir, og tað er stór avbjóðing hjá okkum øllum, sigur Jógvan Martin Olsen.

Tá ið B68 flutti niður í 2012, spældi liðið eina ferð í Runavík. Tá var úrslitið 2-0 til B68.

Trygvi Mortensen er venjari aftur í barndómsfelagnum NSÍ, har hann fleiri ferðir áður hevur havt ábyrgdina.

– Vit kunnu ikki renna undan, at vit verða roknaðir sum favorittar á heimavølli ímóti B68, men talan er um grannauppgerð, og tá kann alt koma fyri. Vit halda fram við at samanseta lið, sum er mannað við monnum, ið eru uppvaksnir í felagnum. Samansetingin er góð. Nakrir hava nógvar royndir, og aðrir eru ungir, raskir og gávuríkir, staðfestir Trygvi Mortensen.

joannes@sosialurin.fo

ÍF
Ivasamir: Høgni Zachariassen og Jákup Mikkelsen

KÍ
Ikki við: Rodrigo Silva (vantandi arbeiðsloyvi)
Ivasamur: Henry Heinesen

NSÍ
Skaddir: Justinus R. Hansen (Nakrar vikur)
Leikbann: Jens Joensen (1 dyst)

SKÁLA
Ikki við: Mark Ryutin (vantandi arbeiðsloyvi)

VÍKINGUR
Allir mans tøkir.